# Eitt listafólk verður heiðrað

*Mánadagin verður níggjunda listafólkið heiðrað við gávugóðsi úr Grunni Thorvalds av Steinum. Seinasta, at fáa gávugóðs úr grunninum, var Marianna Mørkøre, listakvinna*



**Tey eru:**

| | | |
|---|---|---|
| 2001: | Rannvá Kunoy, listakvinna | 60.000 kr |
| 2002: | Andrass Olsen, trambonspælari | 60.000 kr |
| | Teitur Árnason, filmsleikstjóri | 25.000 kr |
| | Petur Elias Askham Guttesen, rithøvundur | 25.000 kr |
| 2003: | Tróndur Bogason, tónleikari og tónaskald | 60.000 kr |
| 2004: | Marjun Kjelnæs, rithøvundur | 25.000 kr |
| | Jógvan Sverrason Biskopstø, sniðgevi og teknari | 25.000 kr |
| | Eivør Pálsdóttir, songkvinna | 25.000 kr |
| 2005: | Bárður Oskarsson, teknari og rithøvundur | 60.000 kr |
| 2006: | Jóhanna Reginsdóttir av Steinum, sniðgevi | 60.000 kr |
| 2007: | Sámal Blak, myndahøggari og listamálari | 60.000 kr |
| 2008: | Marianna Mørkøre, listakvinna | 60.000 kr |

Handanin av gávugóðsinum fer fram í hølunum hjá Fróðskaparsetri Føroya, mándagin 9. februar klokkan 14.00.

Mánadagin 9. februar verður almenn móttøka á Fróðskaparsetrinum, í samband við at gáva verður latin úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum. Hetta er níggjunda árið á rað, at Grunnur Thorvalds av Steinum letur gávugóðs úr grunninum

60.000 kr í gávu úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum verður latið einum ungum listafólki, sum siður er. Gávan verður latin listafólki, sum nevndin metir skarar framúr, og sum tí kann koma langt á síni listarligu leið.

Endamálið við grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki til at fáa sær listarliga útbúgving. Thorvald Poulsen av Steinum, ið stovnaði grunnin, var gartnari í Havn og hevði stóran áhuga fyri bókmentum og list. Tað ber ikki til at søkja pening úr grunninum, men finnur nevndin í grunninum í staðin sjálv fram til ung listafólk, sum tey meta hava serligt hegni.

Nevndarlimirnir í Grunni Thorvalds av Steinum eru: Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum og formaður í grunninum, Oddfríður Marni Rasmussen, formaður í LISA og Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Hetta er 9. árið á rað, at gávugóðs verður latið úr grunninum. Gávugóðsið var fyrstu ferð latið í 2001, og síðan hava 12 ung listafólk fingið gávu úr grunninum.

# Rúsdrekka vandameiri enn hassj

**Rúsdrekka og tubbak er vandameiri enn hassj, lsd og ecstasy. Tað staðfestir ein kanning hjá bretskum professarum**

Professarin David Nutt frá Britain's Bristol University kunngjørdi í farna ári eina kanning, ið staðfestir, at lóglig evnir sum rúsdrekka og tubbak eru vandameiri enn eitt nú hassj, lsd og ecstasy.

Nutt hevur saman við starvsfeløgunum sínum gjørt eina sera umfatandi kanning av rúsevnum, og kanningin setir spurnartekin við, hvørt tað skal verða lógligt at drekka rúsdrekka og roykja tubbak, tá hesi evni eru vandameiri enn rúsevnir, ið eru bannað við lóg nærum allastaðni í heiminum.

Nutt hevur fingið stóra viðurkenning fyri hansara kanningararbeiði, og millum annað eru professarar úr høgt mettum universitetinum sum Oxford University og University of Queensland í Brisbane samdir í, at kanningin hjá Nutt er fyrsta stigið til at meta um, hvørt lógirnar í Bretlandi og aðrastaðni eru hóskandi ella ikki.



**Yvirlitið yvir vandamestu evnuni:**

1. Heroin
2. Kokain
3. Barbiturates
4. "Street" methadone
5. Rúsdrekka
6. Ketamine
7. Benzodiazepines
8. Amphetamine
9. Tubbak
10. Buprenorphine
11. Cannabis
12. Solvents
13. 4-MTA
14. LSD
15. Methylphenidate
16. Anabolic steroids
17. GHB
18. Ecstasy
19. Alkyl nitrates
20. Khat

